# Sætta bridgeferðin hjá Per og Smyril Line

**Ár um ár hugna tey sær við kortspæli umborð á Norrönu. Hesaferð vóru 28 bridgespælarar við í ferðalagnum. Per Kallsberg og Smyril Line skipa í felag fyri bridgetúrunum**

BRIDGEFERÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*28 bridgespælarar vóru við á túrinum hesaferð. Fleiri av teimum eru við árum ár, og onkur hevur verið við øll árini. Umframt bridgespælarar eru eisini makar og onnur við í ferðalagnum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Norrøna:** Millum tey 1.038 ferðafólkini, ið vóru við Norrönu til Danmarkar fríggjadagin, vóru 28 bridgespælarar. Hetta var árliga bridge-ferðin, sum Smyril Line og Per Kallsberg skipa fyri á hvørjum ári. Hetta er sætta ferðin.

Hesa vikuna verða seinastu túrarnir hjá Norrönu eftir summarferðaætlanini avgreiddir. Síðani nýggja Norröna fór í sigling 10. apríl hava gott og væl 100.000 fólk siglt við skipinum. Alt árið í fjør sigldu 87.000 fólk við gomlu Norrönu.

Túrarnir við kortspælarunum plaga at verða í endanum av summarsiglingini, og soleiðis var eisini hesaferð.

– Tað er sjálvandi fyrst og fremst hugnin og tað at vera saman í felag, ið fær okkum avstað ár eftir ár, sigur Per Kallsberg, íðin bridgespælari, sum fyriskipar ferðina. Tí verður eisini dentur lagdur á máltíðirnar og hugnan um kvøldið, sigur hann.

– Tiltakið er fyri øll sum hava áhuga fyri brigdespæli, tað er eingin treyt, at tú ert limur í nøkrum bridgefelag, sigur Per Kallsberg. Vanliga eru eini 5-7 borð við – millum 25 og 30 fólk. Á ferðini verður bara kappast fyri pør.

Sum fyriskipari plagar Per Kallsberg sjávlur ikki at hava nakran makkara.

– Tí so kann eg altíð traðka til, um onkrum vantar ein makkara, ella um onkur av hinum ferðafólkunum hevur hug at royna seg, sigur hann. Og soleiðis var eisini, tá vit hittu Per í brigdspælinum. Makkari hansara var ein dani, sum var millum ferðafólkini, og sum hevði hug at royna seg í kortspælinum.

Hóast eingin »Norrönameistari í bridge« verður skírdur á hesum ferðunum, so vinna kortspælararnir tó matbillettir o. a., sum njótast kann umborð. Per leggur dent á, at tað er hugnin og samveran, sum er í hásæti. Hann sigur eisini, at nógvir av bridgespælarunum eru teir somu ár um ár, og at onkrir teirra hava veri við øll árini. Smyril Line letur teimum avsláttur í ferðaseðlunum, og tí eru tað eisini nógvir makar við í ferðalagnum, sum tó ikki spæla bridge, men einans eru við fyri at hugna sær.

Í næstu viku fer Norröna at sigla eftir vetrarferðaætlanini, og har er tann broytingin gjørd, at Norröna nú eisini fer at sigla til Noregs á vetri. Á ferðini til Danmarkar leggur Norröna at í Hetlandi bæði á veg heim og á veg niður. Mánadag verður nú siglt til Bergens í Noreg, har eisini lagt verður at í Hetlandi á báðum ferðunum. Sostatt verður Norröna nú at síggja í Hetlandi fýra ferðir um vikuna.




# Arbeiðsloysið fekk renturnar at lække

MARKNAÐARRÁK
*Kaupthing*

Eftir at lánsbrævarenturnar seinastu tvær vikurnar at kalla hava staðið í stað, fóru tær aftur at hækka í byrjanini av farnu viku. Orsøkin var, at vinnulívsmenn í framleiðsluvinnuni í USA eru vornir enn mera bjartskygdir. Longu í byrjanini av vikuni, tá roknað var við hesum, fóru renturnar at hækka, og tá bjartskygnið varð staðfest týsdagin, hækkaðu renturnar uppaftur meira.

Bjartskygnið og positiva gongdin í USA, hevur fingið evruna at vikna enn meira mótvegis dollaranum, og hetta er gott fyri evropiska búskapin og virkar stimbrandi, eins og ein rentulækking

Leingið hevur verið tosað um, at amerikanski arbeiðsmarknaðurin er ein meinbogi fyri búskaparligu framgongdini í USA. Fríggjadagin, varð slakka støðan endurtikin tá ein uppgerð vísti, at 93.000 arbeiðspláss fóru fyri skeyti í USA í august, hóast arbeiðsloysið fall úr 6,2% í 6,1%. Uppgerðin fekk beinanvegin dollarin at vikna, men hann hevur kortini rættað seg nakað síðani. Eftir at renturnar vóru hækkaðar fyrr í vikuni, fóru hesar aftur at fella av hesum tíðindunum. Alt í alt eru renturnar sostatt broyttar lítið seinastu vikuna. Marknaðarrák metur at um árskiftið fer at ganga betur á arbeiðsmarknaðinum, og at tá kann dik koma á amerikanska og hervið eisini evropiska búskapin.

Hósdagin í farnu viku hevði evropiski miðbankin mánaðarliga rentufund teirra. Júst sum væntað varð evropiska rentan ikki broytt. Roknast kann við, at hendan rentan og eisini danska diskontorentan, ikki hækka næsta árið ella so.

Eftir øllum at døma, verður hendan vikan friðarlig á altjóða virðisbrævamarknaðunum, og ikki fyrr enn fríggjadagin koma nýggjar áhugaverdar ábendingar um gongdina í amerikanska búskapinum. Hinvegin eru tvær hendingar í vikuni, sum hava áhuga.

Hósdagin 11. september er tvey ára dagurin fyri ræðuligu yvirgangsatsóknina í USA. Dagurin kann fáa sálarligt árin á marknaðirnar, soleiðis at lítið verður handlað. Sunnudagin 14. september skulu sviar atkvøða, um teir skulu upp í evrusamstarvið. Í løtuni liggur nei vongurin á odda við umleið 10% og útvið 30% av svium eru óvísir í, hvat atkvøðast skal. Sannlíkindið er tí størst fyri einum nei, men sum so oftani er sæð áður, kann alt henda við einari slíkari atkvøðugreiðslu. Marknaðarrák metir, at eitt nei kann fáa ávirkan á hvat danir fara at atkvøða, tá túrurin aftur kemur til teirra.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% → |
| 2 ára lánsbræv | 2,94% | 0,01% ↑ |
| 5 ára lánsbræv | 3,72% | 0,03% ↑ |
| 10 ára lánsbræv | 4,41% | 0,04% ↑ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 244,2 | 2,9% ↑ |
| OMX, Svøríki | 591,9 | 0,3% ↑ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.512,2 | 0,1% ↑ |
| S&P 500, USA | 1.008,0 | 1,4% ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,58 | 0,0% → |
| Evru Lánsbrøv | 164,67 | 0,2% ↑ |
| Norrøn Partabrøv | 68,23 | 0,0% → |
| Altjóða Partabrøv | 74,26 | 0,4% ↑ |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 676,15 | -1,1% ↓ |
| EUR | 742,51 | -0,1% ↓ |
| GBP | 1.066,30 | -0,7% ↓ |
| NOK | 90,20 | 0,9% ↑ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fríðgerð Joensen Svínoy 70 ár



Í dag, týsdagin 9. september, fyllir Fríðgerð Joensen í Svínoy 70 ár. Ivaleyst munnu øll, sum nógvu tey seinastu árini hava verið í Svínoy, komast við Fríðgerð. Inntil eina ferð fyrr í ár hevði hon handilin. Eftir at hon stongdi, hevur eingin handil verið í Svínoy.

Fríðgerð er svínoyingur. Dóttir Onnu og Jóannes Joensen, sum var bóndi í Heimistovu. Anna var dóttur Ingu og Símun Júst Jacobsen, sum var læraralærdur og eisini hevði handil. Hann var eitt skifti løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin.

Anna og Jóannes áttu sjey børn: Jógvan, Hans Jacob, Ragnhild, Símun, Valborg, Ingibjørg og Fríðgerð, sum er yngst, og bara var ellivu ára gomul, tá ið mamman doyði í 1944. Jógvan og Fríðgerð búgva í Svínoy, Ragnhild og Ingibjørg búgva í Klaksvík, og Valborg býr í Norðdepli. Hans Jacob og Símun, sum báðir eru farnir, búðu í Klaksvík.

Í barndómsheiminum hjá Fríðgerð vóru eisini fastur hennara, Jóhanna, og Frida, sum var systkinabarn pápan. Tær vóru báðar ógiftar og vóru kærkomnir stuðlar hjá Jóannesi, eftir at hann hevði mist konuna, sum bara var 43 ára gomul, tá ið hon doyði.

Fríðgerð giftist í 1956. Tá fluttu hon og maðurin í húsini hjá fastrini, Anniku, og Heina Justinussen, sum áttu hús í Klingrugarði. Tey bæði vóru tá flutt til Klaksvíkar at búgva. Frida og Jóhanna vóru frammanundan fluttar niðan í Klingrugarð at búgva.

Fríðgerð giftist við Heina Joensen, sum er ættaður úr Svínoy, og tey hava øll árini búð í Svínoy. Í so lítlari bygd er tað kærkomið við teimum, sum á ein serligan hátt eru stuðlar undir lítla samfelagnum. Eingin ivi er um, at Fríðgerð og Heini hava talst og teljast millum sovorðin fólk. Heini var skipsmaður og útróðrarmaður. Í nógv ár róði hann út við Fuglbergi og Áarbergi, sum svínoyingurin Poul Justinussen í Klaksvík átti.

Miðskeiðis í seksti árunum keyptu Fríðgerð og Heini sær hús uppi á Váli. Fríðgerð hevur altíð verið heima. Hon tók sær av manni og børnum.Heini hevur havt festi Har Heimi, sum tað verður rópt, og Fríðgerð hevur verið honum stórur stuðul, og tey bæði hava verið álit hjá so mongum øðrum, sum hava átt jørð í Svínoy. Fríðgerð hevur havt serliga gott samband við eldra fólkið í bygdini. Í mong ár hava tey bæði havt við kirkjuna at gera. Prestur býr altíð hjá teimum, tá ið hann vitjar bygdina.

Fríðgerð og Heini eiga tvey børn. Heri og Anna Jórun búgva bæði í Havnini. Hann er prestur í Vesturkirkjuni, og hon er pedagogur.

Erik Ludvigsen:

# 25 ferðir við Skipafelagnum




*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í gjár, mánadagin 8. september, kom danski løgfrøðingurin Erik Ludvigsen fyri 25. ferð til Føroya við farmaskipi hjá Skipafelagnum Føroyar. Hesaferð við Lómi.

Erik Ludvigsen er 78 ára gamal, hann er føddur í Havn í 1925. Foreldrini vóru Erna og Knud Ludvigsen, tey vóru bæði donsk. Pápin var stjóri í Føroya Banka frá 1922-1945. Familjan búði í ovastu hæddini í bygninginum hjá Føroya Banka í Havn, sum tá var í Tórsgøtu, har sum Tilhaldið er í dag. Tey vóru trý systkin, Erik og ein tvíburasystir og ein eldri beiggi. Tey fluttu til Danmarkar at búgva í 1945.

Erik býr í Aalborg, hann er útbúgvin løgfrøðingur og hevur undirvíst á handilsskúlanum og á universitetinum í býnum.

Frá 1945 til 1980 var hann bert tvær ferðir í Føroyum, hetta var í 1972 og 1979. Men síðan 1980 hevur hann nú ferðast 25 ferðir við farmaskipunum hjá Skipafelagnum millum Danmark og Føroyar. Erik sigur, at honum dámar best hendan mátan at ferðast uppá, man fær líkasum sálina við sær. Man merkir at man er umborð á einum skipi, tá man fær sjóverk. Tá man er umborð á einum arbeiðsskipi, merkir man veruliga, hvat tað er at sigla. Í staðin fyri at ferðast við einum luksusleinara við øllum hentleikum, sigur hann.

Hann er sera væl nøgdur við tænastuna, hann hevur fingið umborð á bátunum hjá Skipafelagnum hesi árini. Hann hevur ofta havt vinir og familju við sær. Hendan túrin, sum er jubileumstúrurin hjá honum, fekk hann ferðaseðilin ókeypis.

Tá vit spyrja Erik, hví hann ferðast so ofta til Føroya, sigur hann, at hann er føddur í Føroyum og búði her 20 tey fyrstu árini av lívinum, og tey seinnu árini hevur honum longst so nógv eftir at koma til Føroyar, eldri hann blívur, meira leingist honum til landið, har hann varð føddur og vaks upp, sigur hann.

Erik hevur eisini verið próvdómari í vinnulívsrætti á Handilsskúlanum í Havn og í Kambsdali. Onkur kennist ivaleyst við navnið, tí Erik hevur síðan 1997 skrivað lesarabrøv í Dimmalætting um ymisk politisk viðurskifti. Hann var eisini við til at stovna Føroyingafelagið í Aalborg fyri 25 árum síðan, og er hann enn virkin í felagnum.

Erik er giftur við danskari konu, Inger, sum er úr Keypmannahavn, tey eiga tvey børn, ein son og eina dóttir, sum bæði búgva í Keypmannahavn. Inger og Erik eiga fimm ommu- og abbabørn.

Erik Ludvigsen fer aftur til Damarkar við Lómi fríggjadagin. Vit kunnu leggja afturat, at Lómur eisini er 25 ára gamal, hann kom fyrstu ferð á Havnina 25. apríl 1978.

# Minningarorð um Finn Lómstein



Kanska var tað, tí vit komu báðir úr Gøtu - kanska tí vit vóru trímenningar, men tað var heilt vist, ikki tí vit høvdu somu áhugamál í øllum, at Finnur og eg komu at virka so væl saman. Í trý ár í Útvarpi Føroya og 11 ár í Sjónvarpi Føroya møttust vit trúliga hvønn morgun.

Finnur var sonur Eriku og Høgna í Syðrugøtu. Hevði tað gleði í eitt heilt ár at arbeiða sman við Høgna. Álitismaður, sum stóð fyri nógvum av tí laðingararbeiði, sum er gjørt í samband við landsvegin gjøgnum Gøtu.

Finnur líktisk nógv pápa sínum. Ein álitismaður, sum hevði sum uppgávu at fáa tølini at passa - fyrst í Útvarpinum og síðani í Sjónvarpinum. Eitt stórt arbeiði á slíkum stovnum, sum eru mannaðir við fólki, sum ikki altíð skilja, at tað er neyðugt í talverðini at hava kassar at arbeiða við. Fólk, sum arbeiða í fjølmiðlaverðini eru kreativ, og vilja helst ikki bindast av reglum og kassum.

Finnur dugdi stak væl hetta arbeiði. Hann dugdi at sita á kassanum, tá ið hann skuldi, og hann dugdi at lætta lokinum, tá ið tað var neyðugt.

Umframt at umsita fíggjarmál á hesum báðum stovnum, hevði Finnur stóran áhuga fyri samfelagsgongdini. Hann luttók nógv í tjakinum á stovninum, og hann hevði poltiskan áhuga. Neyvan er nakað val farið aftur við borðinum síðani 1960, uttan at Finnur hevur sitið við endan - antin í Útvarpinum ella Sjónvarpinum. Stuttligt var at leggja til merkis, at júst valkvøldini gjørdist hann minst líka spentur sum øll tíðindafólkini og legði doyin á at koma fyrst við úrslitunum.

Menniskjaligt hevði Finnur nógvar góðar síður og hevði yvirskot til at brúka tær til at hjálpa øðrum. Hann dugdi væl at lurta og var mangan góður í ráðum.

Nú er Finnur farin. Svárur er saknurin hjá tær Jórum, gentunum og øllum tykkum í stóra flokkinum. Júst nú hjálpa nokk ongi troystarorð.

Men minnist mann, pápa, verpápa og abba sum eg: Ein álitismann, sum ongantið sveik.

Friður veri um minnið um mína góða vin og arbeiðsfelaga, Finn Lómstein.

**Árni Gregersen**

## Dagurin

**9. september. Gorgonius,** deyður umleið ár 300. Ein av pínsluváttunum í fornkirkjuni, sum varð tikin av døgum undir Diocletianus keisara.